# Jákup helt tætt á besta liðnum

**Føroyski landsliðsmálverjin hevði roknað við, at hann skuldi sita á beinkinum, men leygardagin fekk hann boð um, at hann skuldi spæla, og tað gekk væl**

TIPPELIGAN
*Jóannes Hansen*

Leygardagin høvdu vit her í blaðnum samrøðu við Jákup Mikkelsen. Tá segði hann, at um alt fór at verða, sum venjarin í Molde hevði ætlað, so fór Jákup at sita á beinkinum, tá Molde í fyrsta umfarinum í landskappingini fór at fáa vitjan av Brann úr Bergen. Men soleiðis gekk tað ikki.

Jákup Mikkelsen var í Molde málinum allar 90 minuttirnar, og tað gekk væl. Eingin bóltur fór í málið hjá Jákupi, og Molde vann 2–0. Hetta var fyrsta ferðin síðani 1995, at Molde vann heimadystin ímóti Brann Bergen, so tað átti at boða frá góðum.

Saman við fimm liðfeløgum fær Jákup Mikkelsen frá VG eitt fimm tal fyri avrikið. Ein av viðspælarunum fekk seks, ein trý og hinir fingu fýra.

Ætlanin var annars, at Eddie Gustafsson, sum hevur ættarbond til Bahama oyggjarnar, og sum Molde í heyst keypti úr IFK Norrköping, skuldi vera málverji. Men hann varð ryggskaddur leygardagin, og so sóu teir 6.204 áskoðararnir Jákup Mikkelsen verja Molde málið.

Íslendingurin Andre Sigthorsson setti hol á í 13. minutti. Hann var fyrstur á, eftir at Brann málverjin hevði hálvbjargað frísparksroynd. Brann royndi at koma afturíaftur, og í 2. hálvleiki løgdu teir nógv fyri í álopspartinum, men teir spældu seg ikki til nógvar málmøguleikar, og Jákup tók sær av tí, sum kom innanfyri málrammuna. Í 1. hálvleiki var kortini um reppið, at tað endaði galið. Eftir innlegg úr høgru varð úr trimum metrum stútað upp um Jákup, men bólturin tók tvørtræið.

Tá tað restaðu tríggir minuttir, staðfesti Anders Hesselgaard heimasigurin. Og so er spurningurin, hvussu tað verður við málverjuplássinum í næsta dystinum.

– Vit hava vant meiri í vetur, enn Molde hevur gjørt undanfarnu vetrarnar, sigur venjarin Gunde Bengtson. Hann ætlar, at Molde í hvussu so er skal vinna silvurkrónurnar. Tað gjørdu teir í 1998 og í 1999.

## Rosenborg tapti

Stóra samrøðuevnið eftir fyrsta umfarið í tippuliguni er, at Rosenborg tapti fyrsta dystin á heimavøllinum í Tróndheimi. Úrslitið ímóti Odd Greenland var 0–1. Norskir fjølmiðlar vita at siga, at hetta var fyrsta ferðin nakrantíð, at Rosenborg hevur tapt á heimavølli í fyrsta umfarinum í tippuliguni.

Gamla føroyska felagið í tippuliguni, Sogndal, greiddi 3–3 á útivølli ímóti Moss, men tað vóru teir neyvan nøgdir við. Tá tað restaðu 20 minuttir, var Sogndal frammanfyri 3–0. Fimm minuttir undan leikloki var 3–3, og teir á heimaliðnum iðraðu seg um, at teir ikki fingu sigursmálið. Teir høvdu møguleikar til tað.

Lillestrøm, sum verður mett at vera argasti kappingarneytin hjá Molde í kappingini við Rosenborg, vann 2–0 á heimavølli ímóti Viking úr Stavanger. Hini úrslitini vóru: Vålarenge–Bodø/Glimt 1–1, Bryne–Lyn 0–1 og Start–Stabæk 1–1.

# Vejle tættari niðurflyting

**Christian Høgni Jacobsen var ikki við, tá Vejle á heimavølli legði rygg til stórtap ímóti AB**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Christian Høgni Jacobsen var ikki á vøllinum, tá Vejle sunnudagin hevði vitjan av AB úr Keypmannahavn. Akademisk Boldklub hevur rættuliga funnið stílin, síðani teir í fjør og í vár seldu fleiri av bestu spælarunum. Her verður eitt nú hugsað um Brian Steen Nielsen, René Henriksen, Jan Michaelsen, Steven Lütju og Martin Albrechtsen, sum nú er miðverjuálit í FCK.

Hesa ferð vunnu teir í AB 4–0, og dagsins maður var superveteranurin, Heine Fernandez, sum AB í vár keypti frá FCK. Superveteranurin skoraði innanfyri seytjan minuttir trý mál.

AB fekk ikki fyrsta málið fyrrenn í 63. minutti. Í Vejle vóru teir misnøgdir við, at teir ikki í 1. hálvleiki komu á odda. Í 10. minutti tóktist tað sum um at álopsspælarin Ulrik Balling sendi í stólpan, men í Vejle vildu teir vera við, at bólturin fór í málið og støkk út aftur á vøllin, tí hann hevði rakt í ein jarnstólpa. Men tað dugdu dómarin og linjudómarin ikki at síggja.

## AGF fekk stig

Vejle er triði niðast, og støðan hjá teimum versnaði eitt vet sunnudagin. Lyngby er longu flutt niður, og AGF er á hinum niðurflytingar plássinum. Sunnudagin høvdu teir vitjan av AaB. AGF var frammanfyri bæði 1–0 og 2–1, og teir í Aarhus harmaðust um, at tað ikki eydnaðist at fáa øll trý stigini. Mikkel Beck javnaði við brotssparki, tá tað restaðu fimm minuttir.

Men AGF fekk eitt stig, og harvið tóku teir seg eitt sindur inn á Vejle. Sunnudagin skal Vejle spæla í Viborg, meðan AGF skal spæla á útivølli ímóti AB. Tað verður ikki fyrrenn mánakvøldið.

Esbjerg hevði ikki skorað í fýra dystum, tá teir sunnudagin fingu vitjan av Viborg. Heimaliðið misnýtti eina røð av málmøguleikum, men tað kundi ikki taka gleðina frá teimum yvir, at tað eydnaðist teimum at skora eitt mál og harvið at vinna øll trý stigini.

Silkeborg, sum hevði beina kós ímóti niðurflyting, tá teir í heyst góvu Benny Johansen sekkin, tykist hava bjargað sær plássinum í bestu deildini. Hesa ferð høvdu teir vitjan av OB, sum hevur staðið seg so væl í vár. OB var á odda 2–0, men Silkeborg megnaði at koma afturíaftur og at javna til 2–2. Tað boðar frá, at moralurin er í lagi.

Umframt omanfyri nevndu dystirnar verður spælt soleiðis sunnudagin: OB-Esbjerg og FCM-Lyngby. Men áðrenn danir koma so langt, skulu teir í annaðkvøld spæla landsdyst á heimavølli ímóti Ísrael.

# Støður uttanlanda

**Danska superligan**

| | d | v - j - t | mál (v) | mál (t) | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Brøndby | 27 | 16 - 7 - 4 | 59 | 24 | 35 | 55 |
| 2 FCK (M) | 27 | 15 - 8 - 4 | 48 | 18 | 30 | 53 |
| 3 AaB | 27 | 14 - 6 - 7 | 45 | 35 | 10 | 48 |
| 4 OB | 27 | 11 - 9 - 7 | 43 | 39 | 4 | 42 |
| 5 AB | 27 | 10 - 11 - 6 | 41 | 26 | 15 | 41 |
| 6 Esbjerg | 27 | 12 - 5 - 10 | 37 | 35 | 2 | 41 |
| 7 FCM | 27 | 10 - 9 - 8 | 33 | 24 | 9 | 39 |
| 8 Viborg | 27 | 8 - 10 - 9 | 34 | 33 | 1 | 34 |
| 9 Silkeborg | 27 | 6 - 7 - 14 | 31 | 38 | -7 | 25 |
| 10 Vejle | 27 | 5 - 8 - 14 | 31 | 62 | -31 | 23 |
| 11 AGF | 27 | 4 - 10 - 13 | 32 | 45 | -13 | 22 |
| 12 Lyngby | 27 | 2 - 8 - 17 | 21 | 76 | -55 | 14 |

*Føroyskir leikarar:*Christian Høgni Jacobsen (Vejle), Todi Jónsson (FCK)

**Danska 1. deild**

| | d | v - j - t | mál (v) | mál (t) | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Køge | 19 | 14 - 2 - 3 | 40 | 19 | 21 | 44 |
| 2 Frem | 21 | 12 - 6 - 3 | 42 | 22 | 20 | 42 |
| 3 Farum | 20 | 12 - 6 - 2 | 42 | 26 | 16 | 42 |
| 4 HFK Sønderj. | 20 | 12 - 3 - 5 | 40 | 32 | 8 | 39 |
| 5 Herfølge | 20 | 10 - 6 - 4 | 29 | 19 | 10 | 36 |
| 6 B 1913 | 20 | 10 - 5 - 5 | 33 | 27 | 6 | 35 |
| 7 Randers F. | 20 | 9 - 5 - 6 | 37 | 23 | 14 | 32 |
| 8 AC Horsens | 20 | 8 - 6 - 6 | 28 | 23 | 5 | 30 |
| 9 FC Aarhus | 20 | 6 - 6 - 8 | 26 | 31 | -5 | 24 |
| 10 Hvidovre | 20 | 5 - 7 - 8 | 32 | 37 | -5 | 22 |
| 11 Brønshøj | 20 | 5 - 5 - 10 | 28 | 39 | -11 | 20 |
| 12 B 1909 | 20 | 5 - 5 - 10 | 32 | 45 | -13 | 20 |
| 13 B93 | 20 | 4 - 4 - 12 | 26 | 44 | -18 | 16 |
| 14 Kolding FC | 20 | 4 - 3 - 13 | 31 | 48 | -17 | 15 |
| 15 Fredericia | 19 | 3 - 5 - 11 | 22 | 28 | -6 | 14 |
| 16 Skive | 20 | 2 - 4 - 14 | 22 | 47 | -25 | 10 |

*Føroyskir leikarar:* Atli Gregersen (Randers F.), Óli Johannesen (Hvidovre), Johan Byrial Hansen (Fredericia)

**Norska tippeligan**

| | d | v - j - t | mál (v) | mál (t) | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Lillestrøm | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 2 Molde | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 0 | 2 | 3 |
| 3 Odd. Grenl. | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 4 Lyn | 1 | 1 - 0 - 0 | 1 | 0 | 1 | 3 |
| 5 Sogndal | 1 | 0 - 1 - 0 | 3 | 3 | 0 | 1 |
| 6 Moss | 2 | 0 - 1 - 1 | 3 | 3 | 0 | 1 |
| 7 Stabæk | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 8 Bodø/Glimt | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 9 Våleranga | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 10 Start | 1 | 0 - 1 - 0 | 1 | 1 | 0 | 1 |
| 11 Rosenborg | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 12 Bryne | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 13 Viking | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| 14 Brann | 1 | 0 - 0 - 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |

*Føroyskir leikarar:* Jákup Mikkelsen (Molde)

**Hollendska toto-deildin**

| | d | v - j - t | mál (v) | mál (t) | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 FC Zwolle + | 31 | 20 - 7 - 4 | 58 | 31 | 27 | 67 |
| 2 RBC Roo'daal | 31 | 20 - 5 - 6 | 73 | 35 | 38 | 65 |
| 3 Excelsoir + | 31 | 19 - 7 - 5 | 69 | 30 | 39 | 64 |
| 4 ADO Den Haag | 31 | 18 - 7 - 6 | 51 | 31 | 20 | 61 |
| 5 Emmen | 31 | 16 - 7 - 8 | 49 | 37 | 12 | 55 |
| 6 Cambuur/L.+ | 31 | 14 - 6 - 11 | 46 | 36 | 10 | 48 |
| 7 FC Volendam | 31 | 13 - 7 - 11 | 60 | 45 | 15 | 46 |
| 8 Heracles A. | 31 | 13 - 5 - 13 | 48 | 48 | 0 | 44 |
| 9 BV Veendam | 31 | 12 - 6 - 13 | 52 | 54 | -2 | 42 |
| 10 Dordrecht '90 | 31 | 10 - 9 - 12 | 57 | 59 | -2 | 39 |
| 11 Haarlem | 30 | 10 - 7 - 13 | 34 | 39 | -5 | 37 |
| 12 Helmond Sp. | 31 | 8 - 13 - 10 | 31 | 42 | -11 | 37 |
| 13 Storm/Telstar | 30 | 9 - 9 - 12 | 46 | 44 | 2 | 36 |
| 14 MVV | 31 | 8 - 7 - 16 | 42 | 56 | -14 | 31 |
| 15 VVV | 31 | 9 - 4 - 18 | 45 | 62 | -17 | 31 |
| 16 G.A. Eagles | 31 | 7 - 9 - 15 | 40 | 56 | -16 | 30 |
| 17 Eindhoven | 31 | 6 - 6 - 19 | 44 | 74 | -30 | 24 |
| 18 Top/Oss | 31 | 3 - 5 - 23 | 23 | 91 | -68 | 14 |

Perioduvinnararnir eru merktir »+«
*Føroyskir leikarar:* Súni Olsen (FC Zwolle)

**Enska 3. deild**

| | d | v - j - t | mál (v) | mál (t) | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 Plymouth | 44 | 29 - 9 - 6 | 65 | 27 | 38 | 96 |
| 2 Luton | 45 | 29 - 7 - 9 | 94 | 48 | 46 | 94 |
| 3 Cheltenham | 44 | 21 - 14 - 9 | 66 | 47 | 19 | 77 |
| 4 Mansfield | 45 | 23 - 7 - 15 | 70 | 60 | 10 | 76 |
| 5 Rochdale | 45 | 20 - 15 - 10 | 63 | 51 | 12 | 75 |
| 6 R&D | 45 | 19 - 13 - 13 | 65 | 51 | 14 | 70 |
| 7 Shrewsbury | 45 | 20 - 10 - 15 | 64 | 51 | 13 | 70 |
| 8Hartlepool | 45 | 19 - 11 - 15 | 72 | 48 | 24 | 68 |
| 9Scunthorpe | 45 | 18 - 14 - 13 | 73 | 56 | 17 | 68 |
| 10 Kidderm. | 45 | 19 - 9 - 17 | 56 | 46 | 10 | 66 |
| 11 Hull C. | 45 | 16 - 12 - 17 | 56 | 50 | 6 | 60 |
| 12 Southend | 45 | 16 - 12 - 17 | 51 | 54 | -3 | 60 |
| 13 Macclesfield | 45 | 15 - 12 - 18 | 41 | 52 | -11 | 57 |
| 14 Exeter | 45 | 14 - 13 - 18 | 48 | 71 | -23 | 55 |
| 15 York | 44 | 15 - 9 - 20 | 51 | 66 | -15 | 54 |
| 16 Darlington | 44 | 14 - 11 - 19 | 57 | 66 | -9 | 53 |
| 17 Carlisle | 44 | 12 - 15 - 17 | 49 | 54 | -5 | 51 |
| 18 Torquay | 45 | 12 - 14 - 19 | 44 | 61 | -17 | 50 |
| 19 Swansea | 45 | 13 - 11 - 21 | 51 | 75 | -24 | 50 |
| 20 Leyton O. | 45 | 12 - 13 - 20 | 54 | 71 | -17 | 49 |
| 21 Oxford Utd. | 45 | 11 - 14 - 20 | 52 | 60 | -8 | 47 |
| 22 Bristol R. | 44 | 11 - 12 - 21 | 39 | 55 | -16 | 45 |
| 23 Lincoln C. | 45 | 10 - 15 - 20 | 43 | 61 | -18 | 45 |
| 24 Halifax | 45 | 8 - 12 - 25 | 37 | 80 | -43 | 36 |

Føroyskir leikarar: Julian Johnsson (Hull C.)



# Talv í Norðurlandahúsinum

**Seinasta kappingin í hesari røðini av barna- og ungdómskappingum varð hildin leygardagin 13. apríl í Norðurlandahúsinum, sama dag sum Garry Kasparov, 39 ár, hevði føðingardag. Tilsamans luttóku 28 lið og uml. 130 børn**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*



*Hugurin at telva var avbera góður hjá luttakarunum, og hugsunasomu eygnabráðini vóru heilt nógv í tali*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Fjórða og seinasta kapping av hesum slag innan summar er nú lokin, og samanumtikið hava barna- og ungdómskappingarnar verið ein stór succes. Væl yvir 100 børn hava á hvørjum kappingum luttikið og í Havnini tann 3. mars vóru ikki færri enn 220 børn og royndu seg. Talvsambandið og ungdómsnevndin við Jóannes Guttesen, Bergur Johannesen og Reinholdi Isaksen á odda eiga stóran heiður fyri gongdina. Eisini hjálparar úr flestu talvfeløgum okkara og foreldur hava stuðlað óførað væl hesu positivu menning.

Forsetin í Talvsambandi Føroya, Rani Nolsøe, hevur alt gott at bera tiltøkunum, og eisini seinastu kapping í vár í Norðurlandahúsinum.

– Tað gekk óføra væl við fyrireikingunum til allar kappingarnar. Góð kappingarleiðsla og góð hjálparfólk hevur verið lykilin til okkara succes. Stemingurin í Norðurlandahúsinum leygardagin var avbera góður, og gleðiligt var at síggja ein fullan sal við ivrigum børnum og foreldrum, sigur Rani Nolsøe.



*Stemingurin í Norðurlandahúsinum leygardagin var avbera góður, og gleðiligt var at síggja ein fullan sal við ivrigum børnum og foreldrum, sigur Rani Nolsøe um tiltakið*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Við fyri at læra fyrst og fremst

Lið úr Havnini og Klaksvík hava ikki óvæntað dominerað kappingarnar. Feløgini bæði hava eina stóra breidd. Tað mest umráðandi í hesum kappingum hevur tó sjálvsagt verið at verið við fyri at læra og hugna sær við javnaldrum kring landið. Kappingarhugurin kemur so líðandi. Øll feløg hava verið umboðandi, harav eisini skúlar, so sum Venjingarskúlin í Havn, felagskúlin á Oyrarbakka og Kollafjarðar skúli.

## Heiðursbræv til øll

Karin Kjølbro setti kappingina og eftir lokna kapping handaði Landsstýrismaðurin við Mentamálum Óli Holm, steyp og heiðursmerkir til vinnararnar. Øll luttakandi børnini fingu eitt serligt TSF-heiðursbræv.

## Úrslitini vórðu hesi:

Fyri børn upp til 4. flokk vunnu:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | KTF | 3 | 7,5g |
| 2 | HT | 3 | 6,5 |
| 3 | MT | 1 | 6,0g |

Fyri børn frá 5. flokki og upp eftir vunnu:

| | | | |
|---|---|---|---|
| 1 | HT | 1 | 40,5 |
| 2 | KTF | 1 | 37,5 |
| 3 | KT | 1 | 25,0 |

Sostatt er av á hesum sinni við barna- og ungdómskappingunum, men eftir summar verður farið til brots aftur.

– Barna- og ungdómskappingarnar verða uppafturtiknar til heystar. Tá verður helst ein av kappingunum fyriskipaðað sum úttøkukapping til NM fyri unglingar, sum verður í Føroyur feb. 2003. Enn er tó eingin endaliga støða tikin til hetta mál. Talv er í dag vorðin ein av teimum størru ítróttargreinunum í Føroyum, sigur Rani Nolsøe at enda.

Og júst hetta hava luttakaratølini til kappingarnar í vár væl prógvað.


# Hvar er bólturin?




það er ikki loyvt at kopiera henda lepa

**Gitið, hvar bólturin er, og vinnið eina ferð til stórdystin millum FCK og Brøndby**

12. mai í ár verður stórdystur í Danmark. FCK tekur tá ímóti Brøndby, og longu nú er líkt til, at hetta verður dysturin, sum ger av, hvar DM-gullið skal fara í ár.
Sum kunnugt skipa Atlantic Airways og Sosialurin fyri ferð til Keypmannahavnar í samband við dystin, og nú ber til hjá onkrum hepnum lesara at vinna sær pláss á hesi ferð.

Tað ræður snøgt sagt um at gita, hvar bólturin eigur at vera á myndini. Skrivað á lepan, í hvørjum teigi tú heldur bólturin eigur at vera, og send síðani lepan til okkara. Allir lepar við rætta svarinum verða latnir í ein pott, og hin 27. apríl fara vit at kunngera, hvør hepni vinnarin er. Um so er, at hesin longu hevur keypt sær ferðaseðil til dystin, ber sjálvandi til at fáa hendan endurgoldnan. Kappingin verður í blaðnum til og við 23. apríl. Minnist til. Jú fleiri lepar tit senda inn, størri er møguleikin fyri at gerast hepni vinnarin.

**Navn:** ______________________
**Bústaður:** ______________________
**Tlf:** ______________________
**Eg giti, at bólturin er í teigi:** ______________________

**Seðilin skal sendast til:**
**Sosialurin, postsmoga 76, 110 Tórshavn.**
**Merkið brævbjálvan "FCK"**

Sosialurin
ATLANTIC AIRWAYS